# FØÐINGAR

26. mai fingu Irene og Símun Hammer, Toftir, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3400 gr.

6. juni fingu Anita Mortensen og Jonhard Thomsen, Hvalba, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4570 gr.

8. juni fingu Eyðgerð og Jógvan Kruse, Keypmannahavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 2618 gr.

8. juni fingu Elin og Virgar Dahl, Oyri, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3200 gr.

9. juni fingu Gurði Joensen og Martin Schade, Skælskør, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3920 gr.

9. juni fingu Margit og Gunnar Justinussen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 56 cm. long og vigaði 3700 gr.

9. juni fingu Jógvan Hentze og Alexia Abrahamsen, Signabøur, eina dóttir. Hon var 57 cm. long og vigaði 4150 gr.

10. juni fingu Marjun Haraldsen og Jógvan Pauli Joensen, Miðvágur, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 3650 gr.

10. juni fingu Ella og Moodi Norðberg, Hvalba, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 4250 gr.

10. juni fingu Lena og Gunnar Justinussen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 48 cm. long og vigaði 2565 gr.

11. juni fingu Hjørdis J. Højsted og Gunnar M. Gregoriussen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3850 gr.

11. juni fingu Selma Davidsen og Ólavur Midjord, Hoyvík, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 3650 gr.

12. juni fingu Angelie Mouritsen og Jan Yttesen, Sørvágur, eina dóttir. Hon var 50 cm. long og vigaði 2750 gr.

13. juni fingu Joana Valborg Bjarnastein og Gunnar Restorff ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3050 gr.

13. juni fingu Malan Tyril og Torkil Olsen, Keypmannahavn, eina dóttir. Hon var 48 cm. long og vigaði 3140 gr.

13. juni fingu Emly og Esmar Olsen, Hósvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3400 gr.

14. juni fingu Louisa Siv ertsen og Róðin Hentze, Sumba, ein son. Hann var 44 cm. langur og vigaði 1650 gr.

14. juni fingu Jenny og Høgni á Lakjuni, Fuglafjørður, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3800 gr.

# ANDLÁT

9. juni
**Florensa Hammer,** Froðba, 85 ár
**Michala Joensen,** Fámjin, 89 ár
14. juni
**Arni Hjaltalin,** búsitandi í Haugesund í Norra, 68 ár
**Henry Hansen,** Miðvágur, 79 ár

# KIRKJUR & SAMKOMUR

## Gudstænastur leygardagin 17. juni

*Vesturkirkjan:* kl. 11, familjugudstænasta í sambandi við Drotning Ingridar Meinigheits Barnagarður verður 50 ár. Børnini í Barnagarðinum og Aurora Borealis syngja. Sverri Steinhólm.

## Trinitatis sunnudagur

*Tvøroyri:* P. M. Rasmussen
*Hósvík:* kl. 11,
*Hvalvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10.00,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, lestur
*Havnar kirkja:* kl. 11, prestainnseting, Bjarni Bæk innsetur Elsu Funding
*Miðvágur:* kl. 11, altarg., David Johannesen
*Sjóvar kirkja:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Funningur:* kl. 11, messa,
*Gjógv:* kl. 12.30, messa,
*Eiði:* kl. 14.30, barnagudstænasta, Emil Olsen
*Glyvrar:* kl. 11, Jónsvein Bech
*Gøta:* kl. 11, altarg., Uni Næs
*Viðareiði:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Skopun:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Svínoy:* kl. 12, Heri Joensen

## Ebenezer

Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti .
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

## Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond

Morgunmøti kl. 11, kl. 18 evangeliskt møti.

## Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta, kl. 16 samkomufundur, kl. 22 útimøti (um viðrar).
Mánadagin kl. 06 morgunbøn, kl. 20 bønarskúlin.

## Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum

Sunnukvøldið kl. 18 møti við Ejvindi Mouritsen. Sunnudagsskúlaútferð.
Nú sunnudagin 18. juni ger sunnudagsskúlin á Argjum útferð. Farið verður frá Kirkju- og missiónshúsinum kl. 14. Havið okkurt at eta og drekka við.
Um veðrið ikki er heilt gott, so fara vit kortini at hugna okkum inni onkunstaðni.

## Frelsunarherurin Tórshavn

Leygardagin kl. 11 útimøti.
Sunnudagin kl. 11 møti, Palli Petersen talar, kl. 18 talar major Inger Sofie Tjåland.

## Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli í Hoyvíkar skúla, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Egin og Maritu Hendriksen.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Sunnivu og Hans Jacob, Onnugøta 4. Øll eru vælkomin.

## Rhema á Hálsi

Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli, Fríðtór Debes talar.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 06. Øll eru vælkomin.

## Meinigheitshúsið í Havn

Um viðrar fer sunnudagsskúlin útferð sunnudagin. Farið verður frá Meinigheitshúsinum kl. 14. Havið matpakka við.
Sunnudagin kl. 18 familjumøti við Armgarð og Sverra Steinhólm, innsavnan til ytrimissión.
Týsdagin kl. 20 bíbliutími, Jóh. ev. kap. 18 v. 1-27.
Hósdagin kl. 20 ungdómsmøti.

## KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin 19. kl. 15 eldrasamkoma, vit vitja Armgarð og Sverra Steinhólm í prestagarðinum í Sandagerði.

## Saron, Vestmanna

Sunnudagin kl. 11 morgunmøti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

## Filadelfia, Hósvík

Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 18. Øll eru vælkomin.

## Missiónshúsið í Leirvík

Ungdómsmøti verður í Missiónshúsinum í Leirvík, leygardagin 17. kl. 20 við Karin, Ann-Mari, Margrethu og Kristinu.

## Karmel, Eiði

Sunnudagin kl. 19 møti við Ásmund Olsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Keldan, Skálafirði

Leygardagin kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 17 møti við Paula Høj. Avslutningur í sunnudagsskúlanum, børnini møta kl. 17 í Kelduni, havið matpakka við. http://www.keldan.fo

## Ørkin, Saltangará

Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við Eyðun Jacobsen, sum talar og syngur.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Maybritt og Trúgva Berg, Søldafjørður.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.
Morgunbøn er mána-, miku- og fríggjamorgun frá kl. 6-7.

## Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum

Møti verður sunnudagin við Raimund Langgaard. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Missiónshúsið í Skopun

Sunnudagin kl. 14 sunnudagssskúli og møti kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin kl. 20 bíbliutími.

## Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14, kl. 18 møti við Robert og øðrum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Missiónshúsið í Porkeri

Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Ung fólk av Toftum og Nesi luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

## Samkoman, Sion Vági

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

# Eitt ljós á gøtu míni



*Matt. 28 19:*
*…til navns faðirins og sonarins og hin heilaga anda.*

Kirkjuár okkara er soleiðis skipað, at fyrra helvtin rúmar trimum stórum høgtíðum – jólum, páskum og hvítusunnu – umframt øðrum halgidøgum, og verður tí nevnd festparturin, meðan vit við trinitatis sunnudegi byrja hin festleysa partin og dvølja mest við virksemi og vøkstur og lív kirkjunnar.

Hetta virksemi og hesin vøkstur hevur sínar fyritreytir – at verða íklæddur kraft frá tí høga – tað sum hendi á hvítusunnu, sum vit hava hoyrt um og tí hanga hesi bæði saman: ora et labora = bið og arbeið. Festleysi parturin eitur Trinitatis og merkir tríeindin og hetta heiti skal minna okkum á hvør hann er, sum fær virksemi í lag, skipar fyri tí og kallar fólk til tænastu og í hvørs navni alt virksemi eigur at verða gjørt og til hvørs æru: hin tríeiniga Guðs »til navns faðirsins, sonarins og hin heilaga anda«.

At Guð hevur opinberað seg sum faðirin, sum sonur og sum heilagur andi t.e. sum tríeinur, er ein samfeldur vitnisburður í skriftini, hóast orðið tríeinur sum heiti ikki finst. Men hvussu ein skal skilja hesa talu um hin tríeiniga Guð, hevur verið dúgliga tjakast um í fyrstu tíðini í kristindóminum. Talan um tríggjar persónar í guddóminum, í eindini, er mótsigandi verður hildið, tí persónur setir mark, er ein avmarkað vera, og Guð kann ikki vera bundin, hann fer út um alt mark; men her megu vit minnast til, at Guð er ikki ein tonktur møguleiki, men ein suverenur verunleiki, sum sjálvur sigur, hvussu hann opinberar seg, og í opinbering síni hevur hann sjálvur bæði sett mark og er farin út um hesi mørk t.d. kann hann í Jesu foldarlívi binda seg til eina menniskjuveran samstundis sum hann er allastaðni: Annað mál er at hetta er ringt hjá okkum at fata, tó so, tríeindin finst eisini aðrastaðni, har lív er! ein menniskja er likam, sál og andi. Sálin er hiti, ljós og kraft. Kærleikin er sum Augustin kirkjufaðir málber seg ein tríeind: ein sum elskar, ein, sum verður elskaður og kærleikin sjálvur, sum bindur tey bæði saman.

Men hví nú alt hetta kanska heldur kámu talu um eina tríeind? Jú, fyri at siga okkum, at trúgv okkara er fest at einum livandi, virkandi, skapandi, frelsandi, halgandi Guði, sum trínur inn í lív manna og viðurskifti og ikki ein, sum er heilaspuni og setir í síni tign og ikki fer av fetunum. Hann hevur alt vald í himni og á jørð og kalla og gevur boð um at gera øll til lærusveinar hjá honum og lovar sjálvur at vera við.

Hansara navn er nevnt yvir okkum til vitnisburðar um, at vit tilhoyra honum. Dópsboðini, missiónsboðini, eru ikki tung boð ella eitt ok, sum lagt verður á okkum, ein tung skylda, men eini fagnaðarboð: Hoyrið, hvat hin livandi Guð vil, og hvat hann hevur gjørt og ger og tað hann var, tað er líka so fast, verunligt og vist sum at tað longu er hent og tí kunnu vit við góðum treysti doypa og læra eftir boðum hansara og geva øðrum lut í samlívinum við hin livandi Guð.

*Høgni Poulsen*

# Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 17.6.:*
Georg Egholm, tlf. 448016
*Sunnudagin 18.6.:*
Georg Egholm tlf, 448016 til kl. 17.
*Sunnudagin frá kl. 17:* Knud Jakobsen, tlf. 423006

**Norðoyggjar:**
*Leygardagin og sunnudagin:*
Magnus Magnussen, tlf. 455451

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

## Tannlæknavakt, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.




# Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

**Maritim fyrireiking**
Um nóg nógv tekna seg, byrjar nýtt skeið í maritimari fyrireiking mánadagin 7. august 2000 og endar við próvtøku í desember 2000. Lokið prógv gevur atgongd til víðari lestur á maskinmeistaraskúla og navigatiónsskúla. Til ber at søkja útbúgvingarstuðul.

**Støddfrøði á hægri støði**
Um nóg nógv tekna seg, skipar Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli – í samstarvi við Maskinmeistaraskúlan og Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum – fyri skeiði í støddfrøði á hægri støði fyri maskinmeistarar og onnur.

Skeiðið er ætlað sum partvísur sjálvlestur, og byrjar týsdagin 1. august 2000 og endar við skrivligari og munnligari próvtøku um miðjan oktober 2000. Lokið prógv gevur atgongd til støðisútbúgvingina í stødd- og alisfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

**Upptøkukrøv:**
- maskinmeistaraprógv
- skipsføraraprógv
- studentsprógv við støddfrøði B, alisfrøði B og evnafrøði C ella
- onnur tilsvarandi útbúgving í støddfrøði og alis-/evnafrøði.

**Høvuðsevnini í undirvísingini eru:**
Vektorar í 2 og 3 dimensiónum, vektorfunktiónir, serligar funktiónir, markvirði, infinitesimalrokning, differentialrokning, integralrokning, differentiallíkningar.

**Undirvísingartilfar:**
Preben Madsen: Teknisk matematik bind 2 og 3.
Erhvervsskolernes forlag 1997
Hewlett Packard:
HP48 roknimaskina og HP48 Brugerhåndbog.

**Tilmelding:**
**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**
Frúutrøð 1 • Postboks 353 • 110 Tórshavn
Tlf. 317755 • Telefax 318250

# Verkstaðsfólk

**Til verkstaðið hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir dugnaligum verkstaðsfólki.**

**Vit bjóða**
eitt starv við nógvum ymiskum arbeiðsuppgávum í einum sera spennandi umhvørvi. Góðar arbeiðsumstøður á einum verkstaði við sera góðari útgerð.

**Arbeiðsuppgávur**
Fyri tað mesta er talan um umvælingar av amboðum og maskinum hjá kommununi. Tó eru eisini nakrar uttandura arbeiðsuppgávur, t.d. Eftirlit og viðlíkahald av brandpostum. Harumframt kemur tú at luttaka sum "leysur" sløkkiliðsmaður.

**Førleikakrøv**
Viðkomandi má verða handaligur og hava hollar royndir sum smiður/mekanikari. Neyðugt er at hava vinnuførarabræv til buss yvir 3,5 t.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður at seta skjótast til ber og lønt sambært sáttmála millum Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag og Tórshavnar kommunu.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobesen, varastøðleiðara, tlf. 314881, ella Símin Jákup Hansen, verkstaðsleiðara, á tlf. 319243

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar sløkkilið, Postboks 3240, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 3. juli 2000.

Tórshavnar kommuna

P/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE

# Bókhald/skrivstova

Fyri ein av kundum okkara í Tórshavn søkja vit eftir einum fólki til bókhald og skrivstovuarbeiði.

Arbeiðið umfatar bókhald og alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Tann, sum settur verður í starvið, má kunna arbeiða sjálvstøðugt. Praktiskar royndir eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. juni 2000. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at ringja til Rasmussen & Weihe, lokal 23.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018
Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

# Leiðari søkist til Barnagarðin á Teigunum á Sandi

Sands Bygdarráð hevur sett á stovn ein dagstovn til børn í Sands kommunu í aldrinum 0-9 ár. Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum hevur pláss fyri 10 vøggustovubørnum og 20 barnagarðsbørnum.

Væntandi verður stovnurin klárur til at taka ímóti børnum 1.9.2000.

Hervið verður søkt eftir leiðara til dagstovnin á Sandi at byrja 1.8.2000.

Starvið er eitt fulltíðarstarv.

**Vit sóknast eftir leiðara:**
- Ið er útbúgvin pedagogur (el. líkn.).
- Hevur leiðaraevni.
- Hevur hug til at vera við at seta sín dám á endamálsorðingina fyri stovnin.
- Ið er opin fyri nýhugsan.
- Í samstarv við nevndina og foreldur gera teir fysisku karmarnar klárar.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Meira fæst at vita við at venda sær til bygdarráðsskrivstovuna, tlf. 361034.

Umsóknir saman við viðmæli og upplýsing um útbúgving, skulu í seinasta lagi 10.7.2000 sendast til Sands Bygdarráð, 210 Sandi.

**Sands Bygdarráð**

# Skrivstovuhølir til leigu

Skrivstovuhølir til leigu í bygningi ytst á Argjaboða. Bygningurin stendur í náttúruvøkrum umhvørvi, við sjóvarmálan.

Nærri fæst at vita hjá el & tele, tlf. 354 354.


